# Realskúlagentur í 1960



Myndaeigari: Jenny Simonsen

Mynd frá ”Realskúlaframsýningini 1916-66”, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007.

Myndin her er av gentum í einum realskúlaflokki, sum var á vitjan í Týsklandi í 1960, f.v.: Bodil Holm, Sigrun Nolsøe, Jenny Joensen (Simonsen), Eydna Dalsgaard og Karin Joensen.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa myndina, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (Mynd nr. 395).

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Súsanna Malena Guttesen**
**ættað av Norðskála og búsitandi í Havn**

andaðist týskvøldið 12. august, 85 ára gomul.

Bønarhald verður í kapellinum á landssjúkrahúsinum fríggjakvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni kl. 13.00.

Vegna familjuna
**synirnir**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Andrias Christian Samuelsen**
**Tórshavn**



andaðist mikudagin 13. august, 61 ára gamal.

Bønarhald á landssjúkrahúskapellinum leygardagin 16. august kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer sunnudagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Aja, Elisabeth, Inga, Heri, Andrias, Jónas og Elias**

Tey, ið vilja minnast Andrias, kunnu lata Føroya Felag móti Krabbameini eina gávu, konta í peningastovnunum.

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Súsannu Malenu Guttesen**, vanliga nevnd Lena Guttesen, fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum fríggjakvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin klokkan 13.

Kistan við **Sylviu Hansen** fór úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin klokkan 16. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum fríggjadagin klokkan 15.
Tey, ið vilja minnast Sylviu, kunnu lata eina peningagávu til KFUK. Konto í Eik.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður mín, pápi, verpápi, abbi og beiggi okkara

**Vigtor Albinus**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar, berarar, gravara og øll tykkum, ið á ymiskan hátt hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og fyri peningagávur til Suðuroyar Ellis- & røktarheim.
Tøkk øll tit mongu, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Grete, Bent, Herman og Jan**